# Skjøtil skal nú setast á møguliga oljuvinnu

*-Verður farið undir forkanningar og leitingar eftir kolvetni, verður hetta byrjanin á einari oljuídnaðarligari menning her á landi. Um nakar oljuídnaður kemur í gongd í Føroyum er treytað av teimum úrslitum, ið kanningarnar og leitingin koma til sigur oljuráðleggingarnevndin m.a. í álitinum til landsstýrið í partinum um, hvussu ein møgulig oljuvinna kann hugsast at fara at ávirka føroyska samfelagsbúskapin verður m.a. sagt:*

Viðgerðin av, hvørji búskaparlig árin ein møguligur oljuídnaður kann fara at hava, hevur serliga havt vinnulívið og møguleikarnar fyri at skapa arbeiðspláss í huga, og vart er gjørt við týdningin av, at ávirkanin á privata vinnulívið í Føroyum av einum møguligum oljuvirksemi verður stýrd.

Verður farið undir forkanningar og leitingar eftir kolvetni, verður hetta byrjanin á einari oljuídnaðarligari menning her á landi. Í hesum skeiðinum verður ávirkanin á landsins búskap ikki tann stóra, men ávísir møguleikar eru korini fyri góðum avleiðingum á búskapin.

Hóast forkanningar og leitingarvirksemi byrja, er eingin vissa fyri, at nakar veruligur oljuídnaður nakrantíð kemur í gongd í Føroyum. Hetta er sjálvsagt treytað av teimum úrslitum, ið kanningarnar og leitingin koma til.

Møguligt fyritaksemi á landi í leitingarskeiðinum fer helst ikki at krevja munandi íløgur, og sjálvt um »oljuævintýrið« endar her, verður skaðin neyvan heldur so stórur – við undantaki av, at tað fyritaksemið, ið kanska kemur av leitingini, dettur burtur.

Førir leitingin til ein veruligan oljuídnað, verður neyðugt við politiskum avgerðum um, hvussu nógv av virksemi á landi royndast skal at fáa í tilknýti til hendan ídnaðin.

Sum umstøðurnar eru, er eyðsæð, at tað hevur skund at fáa í lag vinnuligt virksemi í landinum aftur at ti virksemi í fiskivinnuni og fiskiídnaðinum við hartil hoyrandi tænastuvinnu, sum fiskastovnarnir tola. Hetta talar til fyrimunar fyri at leggja stóran dent á virksemið á landi í sambandi við oljuídnaðin.

Oljuútvinning við Føroyar fer at seta ógvuliga stór krøv til íløgur, og rakstrarkostnaðurin verður stórur. Tað verður kanska ein ávísur meirkostnaður hjá oljufeløgunum, um tey skulu keypa vørur og tænastur hiðani (føroyskar fyritøkur eru neyvan kappingarførar á altjóða stigi), men krøv frá føroyskari síðu í hesum sambandi høvdu verið heilt smá í heildarmyndini. Tað hevði kunnað fingið stóra ávirkan á búskapin í okkara lítla samfelag, at fingið lut í peninganøgdum, sum høvdu munað lítið hjá oljufeløgunum.

Her eigur denturin at verða lagdur á týdningin av at hava tamarhald á gongdini innan fyri tað almenna. Eitt nú vuksu almennu inntøkurnar í stórum í byrjanini og miðskeiðis í áttatiárunum m.a. av tollinntøkum frá innflutningi av íløgutólum, orsakað av ti ógvusliga fíggjarliga fyritakseminum í landinum. Hetta førdi við sær almennar útreiðslur, sum ikki hava nakað veruligt samband við grundleggjandi burðarevnini hjá føroyska búskapinum.

Sæð í víðari høpi og um eitt longri tíðarskeið, verða møguligar oljuinntøkur tíðaravmarkaðar, og føroyski búskapurin fer aftur fyrst og fremst at hava fiskivinnuna og fiskiídnaðin at líta á.

Møguligar oljuinntøkur kunnu koruni brúkast til at skapa og menna onnur samfelagsbúskaparlig íkast og ískoyti til fiskivinnuna og fiskiídnaðin.

Í øðrum londum, sum hava havt oljuídnað, finnast dømi um óhepna gongd í vinnulívinum yvirhøvur orsakað av høgum kostnað, og at tann parturin av vinnulívinum, sum ikki byggir á oljuídnaðin, av hesi grund ikki hevur staðið seg væl í kappingini við onnur lond. Tað almenna eigur ti, um kravt verður av oljufeløgunum, at tey skulu keypa føroyskar vørur og brúka føroyska arbeiðsmegi, at hava eitt vakið eyga við vandanum fyri at hetta kann leggja støði undir fyritøkur, sum ikki eru kappingarførar.

Tað, sum um ræður, er at fáa sum mest burtur úr oljuvinnuni til frama fyri samfelagsbúskapin í eitt longri tíðarskeið. Havast má í huga, at krøv um fyrimunir heimanvegin kunnu vera ósambærilig við langtíðarætlanir.




